STARVSLÝSING

## Samskipari til ferðsludepilin

Søkt verður hervið eftir samskipara til ferðsludepilin á vegadeildini á Landsverki at byrja skjótast gjørligt. Ferðsludepilin tekur sær av ferðslu, kunning um ferðslu, ferðslutrygd, ferðsluhagtølum og tilbúgving.

### Arbeiðsuppgávur

Talan er um eitt fjølbroytt og spennandi starv innan ferðslu og tilbúgving. Tú skalt m.a.:

- viðgera ferðslufyrispurningar og umsita ferðslumál
- samskipa tilbúgvingarætlanir fyri tunlar og landsvegakervið sum heild
- samstarva við aðrar stovnar og myndugleikar um ferðslu og tilbúgving

Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi starv, har tú hevur møguleika at seta tíni fingramerki á ferðslu- og tilbúgvingararbeiðið á Landsverki.

### Førleikakrøv

Fyri at røkja starvið mást tú hava hug og evni til at samstarva og samskifta, hava góð evni at leggja til rættis og kunna arbeiða sjálvstøðugt. Fyrimunur er at hava útbúgving sum verkfrøðingur, teknikari, samskipari ella royndir innan ferðslu og/ella tilbúgving.

### Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Umsóknir

Umsóknir verða sendar til:
Landsverk,
Postmoga 78,
FO-110 Tórshavn,
ella við telduposti til lv@lv.fo,
merktar „Samskipari til ferðsludepilin".

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. mai 2008. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Armgarð Steinhólm, sivilverkfrøðing, á tlf. 540 891 ella armgard@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur/byggifrøðingur til framleiðsludeildina

Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi ella líknandi til framleiðsludeildina á Landsverki. Framleiðsludeildin hevur asfalt- og skervverkini og maskindeildina um hendi. Nýggja starvsfólkið fer at hava mest við asfaltverkið og útlegging av asfalti at gera, herímillum at leggja asfaltarbeiði til rættis. Fýra skervverk eru kring landið: í Hundsarabotni, í Porkeri, á Hústoft og á Sandi. Bitumengoymsla er í Hósvík. Asfaltframleiðslan er í Hundsarabotni.

### Arbeiðsuppgávur

Høvuðsuppgávurnar eru tilrættislegging o.a. í sambandi við framleiðslu og útlegging av asfalti, umframt góðskustýring innan virksemið á deildini. Tann, ið fær starvið, kann eisini rokna við at arbeiða við øðrum uppgávum á stovninum. Fasta tilhaldið verður á skrivstovuni í Havn.

### Førleikakrøv

Tú hevur útbúgving sum verkfrøðingur/byggifrøðingur ella líkandi ástøðiliga útbúgving og hevur góðan kt-kunnleika. Fyrimunur er eisini at hava royndir við asfaltframleiðslu, tó at hetta ikki er krav. Rætti persónurin við áhuga fyri at seta seg inn í nevnda virkisøkið fær møguleika at menna seg á hesum øki og fær viðkomandi upplæring.

### Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Umsóknir

Umsóknir við prógvum, lívsgongdarlýsing (cv) og møguligum ummælum skulu sendast til:
Landsverk,
Postboks 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 30. mai 2008. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á tlf. 540 841 ella á to@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

